

*Tað ørkymlar bæði næmingar og lærarar, at allir næmingarnir skuldu dumpa í skipstøkni*

# Allir dumpaðu

**Fyri jól dumpaðu helvtin av skipsføraranæmingunum í uppgávuni í skipstøkni. Fyri fyrstu ferð í søgu skúlans sluppu næmingarnir upp til nýggja roynd, og aftur dumpaðu allir**

Randi Jacobsen

Hvat bagir skipsføraraútbúgvini á Vinnuháskúlanum?

Hesin spurningur brýtist inni í høvdunum á næmingunum, lærarunum og teimum, sum í Mentamálaráðnum vara av útbúgvingini.

Fyri jól vóru næmingar á skipsføraraútbúgvingini á Vinnuháskúlanum til próvtøku, og helvtin av næmingunum dumpaðu í lærigreinini skipstøkni.

Teir kærdu uppgávuna til Mentamálaráðið, sum gav næmingunum viðhald í, at upgávan gekk út um pensumið.

### Nýggj roynd

Fríggjadagin 11. mars var nýggj próvtøka í skipstøkni við 13 næmingum.

Allir dumpaðu.

– Tað má hava verið tí, at teir dugdu ov lítið, sigur Petur Hans Dahl, varaskúlastjóri á Vinnuháskúlanum. Hann hevur tó hoyrt onkran siga, at uppgávan var ov long.

Hetta er fyrstu ferð, at umroynd hevur verið á Vinnuháskúlanum.

Tríggir av teimum 13 næmingunum hava bara skipstøkni eftir. Hinir hava nakrar lærugreinir aftrat, sum teir skulu fylgja fram til í summar.

### Kanska fleiri orsøkir

Næmingarnir eru ørkymlaðir. Sosialurin hevur tosað við onkran teirra, sum sigur, at teir allir hava gjørt nógv við skúlan, og frammanundan ivaðust teir ikki í, at teir fóru at standa royndina. Summir halda, at uppgávan var ov long, og so tosa teir um, at okkurt man hava verið galið við undirvísingini, tí viðhvørt hendir tað, at fleiri dumpa, og í øðrum flokkum eru allir komnir ígjøgnum. Eitt sjónarmið er, at teir hava ov fáar tímar í skipstøkni, sum er torførasta lærugreinin í útbúgvingini.

Eingin næmingur hevur hug enn at gera viðmerking til vánaliga úrslitið í skipstøkni.

# Tyrlan var kvik



Seinnapartin týsdagin var bjargingartyrlan eftir einum barni í Nólsoy og flutti tað á Landssjúkrahúsi.

Kl 14:41 týsdagin fekk tyrlutænastan boð frá MRCC Tórshavn um at fara til Nólsoyar eftir einum lítlum barni.

Skjótt var atborið, og eftir bert 10 minuttum var bjargingartyrlan á flogi. Støðan var av slíkum slag, at mett var at best at hava manning frá sjúkrabilatænastuni við á staðið, so tyrlan lendi á Landssjúkrahúsinum á vegnum til Nólsoyar.

Tyrlan lendi í Nólsoy kl 15:03, og barnið saman við mammuni var flogið til Landsjúkrahúsið hagar tey komu kl 15:08.

# Skulu hava nýggja brummu

**Politiið kannar, hvar í Havn nýggj detensjón kann byggjast. Ein møguleiki er Yviri við Strond, har fútaembætið og politiið nú hava høli**

Randi Jacobsen

Við undantaki av politistunum, sum hava vakt og húsast í tveimum bingjum í politigarðinum, er politistøðin tóm.

Men tó ikki heilt. Brumman er framvegis í kjallaranum, og verða fólk tikin og koyrd í brummuna fyri náttina, ella onkur verður tikin og skal fyri rættin dagin eftir, fara tey í brummuna.

Øll hini hølini á politistøðini eru soppafongd. Sum skilst bagir í so máta brummuni einki, men brummuhølini kunnu ikki vera har, um ein onnur loysn enn bingjuloysnin verður funnin til vaktleiðararar.

### Lítið itøkilig ætlan

– Støða er ikki til, hvar detensjonin skal byggjast, men vit hava søkt Tórshavnar kommunu um loyvi at byggja omanfyri, har politiið heldur til Yviri við Strond, sigur Peter Thaysen, løgregluovasti.

Umsóknin er send kommununi fyri at kanna, um hetta er ein møguleiki. Málið liggur hjá kommununi, sum hevur sent grannunum tað til hoyringar.

Hugsanin við hesum møguleikanum er at byggja, har parkeringskjallari og parkeringspláss eru uppi á dekkinum. Tað fer at kosta nøkur parkeringspláss, um henda loysnin verður vald.

Peter Thaysen sigur, at ætlanin er so lítið ítøkilig enn, at ongar tekningar eru gjørdar.



***Her umhugsar politiið at byggja nýggja brummu***

*Mynd: Jens Kristian Vang*